# Leiðari til Bókamiðsøluna

***Við hesum verður søkt eftir leiðara til Bókamiðsøluna Starvið verður sett 1. august 2002***

**Uppgávur**
Endamálið við Bókamiðsøluni er at vera millumlið millum føroysk forløg og bókasølu í Føroyum og uttanlands. Leiðarin hevur dagligu ábyrgdina av hesum virksemi. Leiðarin hevur fíggjarligu ábyrgdina mótvegis nevndini og er nevndarskrivari. Tað áliggur eisini leiðaranum at menna stovnin.

**Førleikakrøv og royndir**
Umsøkjarar eiga at hava útbúgving innan skrivstovuyrki ella aðra viðkomandi útbúgving. Umsøkjarar við royndum innan fyrisiting og leiðslu hava fyrimun.

**Persónlig førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu kunna arbeiða sjálvstøðugt, duga at skipa fyri, vera miðvísir og hava góð samstarvsevni.

**Vit kunnu bjóða**
Talan er um eitt sjálvstøðugt starv, har dagligt samskifti er við eitt nú forløg, skúlar og bókhandlarar.

**Løn og setanartreytir**
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

**Nærri upplýsingar um starvið**
Møguligir umsøkjarar eru væl komnir at seta seg í samband við Niels Jákup Thomsen, nevndarformann, á tlf. 317644, at hoyra meira um starvið.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, CV og møguligum viðmælum skulu sendast:

**Bókamiðsølan**
Att.: Niels Jákup Thomsen
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn

og skulu vera Bókamiðsøluni í hendi í seinasta lagi á middegi mánadagin 27. mai 2002.

*Bókamiðsølan er millumlið millum føroysk forløg og bókasølu í Føroyum og uttanlands. Bókamiðsølan verður rikin sambært viðtøku, sum Føroya Landsstýrið góðkennir. Í nevndini fyri Bókamiðsøluna eru eitt umboð fyri Føroya Skúlabókagrunn, Føroya Lærarafelag og Føroya Landsstýrið. Trý fólk starvast á Bókamiðsøluni. Heimasíða: www.bms.fo*

# Skála skúli

Søkt verður eftir 1 lærara í tíðaravmarkað starv (umleið 13 tímar) skúlaárið 2002/2003.

Starvið er lønt sambart avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Nærri upplýsingar fáast frá skúlaleiðaranum, tlf. 442118 ella 211360.

Umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 3. juni 2002.

**Skúlastýrið fyri Skála skúla**
v/ Rosu Prestá
480 Skáli

# Starvsfólk

**1 pedagogur og 2 hjálparfólk til Frítíðaransingina í Runavíkar kommunu**

**Søkt verður eftir:**
1 pedagogi at arbeiða 20/25 tímar um vikuna
1 hjálparfólki at arbeiða 20 tímar um vikuna
1 avloysara fyri hjálparfólki í barnsburðarfarloyvi at arbeiða 20 tímar um vikuna (24 vikur).

**Vit bjóða**
Eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum. Dentur verður lagdur á at veita børnunum eitt trygt og mennandi frítíðartilboð.

**Vit ynskja**
At umsøkjarin kann arbeiða sjálvstøðugt. Er kreativ/ur, hevur góð samstarvsevnir og hevur hug at arbeiða við børnum

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett 14. august 2002. Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

**Umsókn**
Skrivlig umsókn, saman við viðmælum og upplýsing um útbúgving, skal verða Barnaansingini í hendi í seinasta lagi 31. mai 2002.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Leilu Weihe á tlf. 448594 lok. 12 ella 256930.

Runavíkar Kommuna

**Runavíkar Kommuna**
Heiðavegur
600 Saltangará

# Sumbiar Kommuna

Heitir á øll tey sum hava bátar, bilar o.a. inni í »Sagverksbygninginum« í Lopra, um at beina tað burtur beinan vegin, og í seinasta lagi 25. mai 2002, ella verður tað beint burtur fyri eigarans rokning.

Eru spurningar, kunnu tit seta tykkum í samband við arbeiðsformannin, tlf. 223904.

**Sumbiar Kommuna**





**STEMPIL OG SKRÚVU KOMPRESSARIR**

**Stationerir og transportablir størri samt smærri**

**Fáast í flestum støddum til øll endamál verkstøð. fiskavirkir, alibrúk, entreprenørar v.m.**

**Kaj Andreasen & Co**
Heilsøla, smásøla og umboð - Tel. 315600 - Fax 318008


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3347
Navn: Sp/f Teknistovan
Adressa: 510 Gøta
Kommuna: Gøtu Kommuna
Stovningardato: 26.03.2002
Viðtøkudato: 26.03.2002
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 40.000,00 til kurs 100 og kr. 40.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
Stovnarar: Jens Klæmint Jacobsen, 510 Gøta og Henning Olsen, 510 Gøta.
Stjórn: Jens Klæmint Jacobsen, 510 Gøta og Henning Olsen, 510 Gøta.
Tekningarreglur: Felagið verður bundið við undirskrift av einum stjóra.
Grannskoðari: : P/F Føroyabók, v/ Victor Nielsen, Vágstún 2, Box 144, 700 Klaksvík.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 26.03.2002 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at reka teknistovu, ráðgeving, handverk, handil, umboðan og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 1. mai 2002

Kristin Balle


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3347
Navn: Sp/f Teknistovan
Adressa: 510 Gøta
Kommuna: Gøtu Kommuna
Stovningardato: 26.03.2002
Viðtøkudato: 26.03.2002
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 40.000,00 til kurs 100 og kr. 40.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
Stovnarar: Jens Klæmint Jacobsen, 510 Gøta og Henning Olsen, 510 Gøta.
Stjórn: Jens Klæmint Jacobsen, 510 Gøta og Henning Olsen, 510 Gøta.
Tekningarreglur: Felagið verður bundið við undirskrift av einum stjóra.
Grannskoðari: : P/F Føroyabók, v/ Victor Nielsen, Vágstún 2, Box 144, 700 Klaksvík.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 26.03.2002 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at reka teknistovu, ráðgeving, handverk, handil, umboðan og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 1. mai 2002

Kristin Balle


**Vit sóknast eftir fólki til fast starv og feriuavloysarum til handilin**

**Arbeiðstíðirnar eru hesar:**
kl. 06.00 – 13.00
kl. 13.00 – 19.00
kl. 19.00 – 23.30
Allar dagar í vikuni.

**P/F Frants Restorff**
**Tórsgøta 13**
**Postsmoga 41**
**110 Tórshavn**
**Tlf. 311060**

frants restorff

Lesið Sosialurin -tað loysir seg

# Kvinnumanningin á Páll Fanga takkar fyri dyggan stuðul

Kvinnumanningin á Páll Fanga vil hervið takka øllum, sum hava stuðlað okkum til ferðina til Scilly oyggjarnar.

**Stuðlarnir eru:**

***Høvuðsstuðul:***
Amerada Hess

***Aðrir stuðlar:***
Alfa Pilot — Bakaríið hjá Jórun
Bakaríið hjá Símun — Elmar Zachariassen
Føroya Seglvirki — Klaksvíkar Fysioterapi
Norðoya Litbúð — Norðoya Sparikassi
Salong Duett — Vera Klipt
Gael Force v/ Símun Gullaksen

Somuleiðis ynskja vit eisini at takka familju, vinum og kenningum og Klaksvíkar Róðrarfelag fyri allan stuðul og hjálp í okkara fyrireikingum og venjingum til ferðina.

**Kvinnumanningin á Páll Fanga 2001 og 2002**
Rannvá Dahl • Ranvá Jacobsen • Olevina Jacobsen
Rósa Petersen • Beinta Klakstein • Anna Mohr
Solby A. Eliasen



Gøtu Kommuna

# Gøtu skúli

Søkt verður eftir 1 lærara í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2002/03.

Starvið er lýst leyst vegna økta tímakvotu.

Starvið er fulltíðarstarv, 26,5 tímar um vikuna.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Lærarafelag í lønarflokkunum 18.1. til 27.4.

Umsóknarfreistin er úti 23. mai kl. 16.00.

Um nærri upplýsingar ynskjast um starvið, ber til at venda sær til skúlaleiðaran, tlf. 441059.

**Gøtu Skúlastýri**
**v/ Mariu Gregersen, 513 Syðrugøta**

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Skrivstovufólk

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir skrivstovufólki til Eysturskúlan at arbeiða fulla tíð.

Í Eysturskúlanum eru 610 næmingar og har starvast 50 lærarar.

**Arbeiðið umfatar**
vanligt skrivstovuarbeiði og roknskaparførslu.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal hava skrivstovuútbúgving, duga at arbeiða sjálvstøðugt og virka í góðum samstarvi við starvsfelagar.

**Starvs- og setanarviðurskifti**
Starvið er fulltíðarstarv og verður sett í juni 2002. Løn sambært sáttmála við Starvsmannafelagið.

**Meiri fæst at vita**
um starvið frá Eyðdis Eidesgaard, skúlastjóra, tlf. 31 47 52 ella Jákupi Simonsen, deildarleiðara á trivnaðarfyrisitingini, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
Skrivlig umsókn við upplýsingum um útbúgving, starvroyndir og møguligum viðmælum skal vera Tórshavnar kommunu, postrúm 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi týsdagin 21. mai 2002. Viðmerk á umsóknina "skrivstovufólk".

SNARSKIVAN

# Skrivstovuhøli til leigu

Við hesum verða skrivstovuhøli á adressuni Yviri við Strond 4 í Tórshavn lýst til leigu. Talan er um nýmótans nýinnrættaði høli og fatar leigumálið um skrivstovuhølir við atgongd til felags fundarhøli, køk, toilet. Leigumálið er 134 m² til víddar og liggur sera væl fyri.

Áhugaði verða biðin um at venda sær til Advokatfelagið og spyrja eftir Jógvan E. Ellefsen ella Petur Even Djurhuus.

Tórmóður Djurhuus, adv.
Jógvan Páll Lassen, adv.
Petur Even Djurhuus, adv.
Jógvan E. Ellefsen, adv.
Anna Dam, adv.
Ingi Højgaard, adv.

**Advokatfelagið við Strond 4**
Yviri við Strond 4 • 100 Tórshavn
tlf. 311260 • fax 311261
e–mail: advokatfelagid@kallnet.fo


Sethúsaklædningur



Plastik er á goymslu

Slitsterkur & viðlíkahaldsfríur

pf Klement Petersen
Høgaból • 600 Saltangará • tel. 447560 • fax 448460


# Pedagogur/-hjálparfólk

## til Bústovnin á Mýrivegi

At arbeiða 40 tímar um vikuna, frá 01.06.02 ella eftir nærri avtalu. Talan er um skiftandi arbeiðstíðir og í vikuskiftum.

Setunar- og lønarviðurskifti sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag.

Á bústovninum búgva 4 ung/børn við autismu. Endamálið við okkara arbeiði er at skipa tryggar karmar hjá íbúgvunum og at seta í gongd og skipa fyri virksemi, sum er til gagn fyri hvønn einstakan.

Umráðandi er at umsøkjarin er væl fyri kropsliga, er áhugaður í at verða nógv úti í náttúruni, svimja o.a. Somuleiðis hevur tað týdning at umsøkjarin hevur góð samstarvs- og innlivingarevni.

Um ongin pedagogur søkir, kann starvið verða sett av hjálparfólki.

Nærri fæst at vita um starvið frá Jóhonnu Hansen leiðara, á telefon 456310.

Umsóknarfreistin er 27.05.02 og skal umsóknin saman við prógvi og viðmæli sendast til:

**Bústovnin á Mýrivegi**
Mýrivegur 13 · 700 Klaksvík
Att: Leiðarin

# Lærarar søkjast

***Søkt verður eftir trimum lærarum til Miðvágs-Sandavágs skúla skúlaárið 2002/2003.***

- ***eitt starv við fullum tímatali fyri lærara í farloyvi***
- ***eitt starv við fullum tímatali til gentu og drong við serligum tørvi í 7. flokki***
- ***eitt parttíðarstarv við uml. 14 tímum um vikuna***

Umsøkjarar, sum kunnu undirvísa í dreingjaítrótti hava fyrimun. Størvini verða lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Lærarafelag í lønarflokki 18.1 til 27.4.

Nærri fæst at vita frá skúlastjóranum, tlf. 332820.

Umsóknir við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu verða skúlastýrinum í hendi innan týsdagin 28. mai og sendast til:

**Skúlastýrið við Miðvágs-Sandavágs skúla**
v/ Gitte Samuelsen, formaður
360 Sandavágur




Eru vit ikki fittir? Mamma okkara er reinur boxari. Um tú vilt eiga okkum, ring so 447832 ella 282877